## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Móttøka fyri nýggjum handli

**HANDLAR**
*Snorri Brend*

Havn: Fríggjadagin læt Farodane Casa upp í nýggja bygninginum hjá Thomas Dam á Hálsi. Við hesum er nú øll møbladeildin hjá Farodane flutt úr Brekkutúni oman á Háls.

Í hesum sambandi var stór móttøka hildin, har almenningurin hevði høvið at síggja stóra úrvalið av møblum bæði til heim, skrivstovu og onnur støð.

Nýggi møblahandilin er í tveimum hæddum, og tilsamans er talan um góðar 500 fermetrar við øllum møguligum bæði til privat og vinnulív.

Tað er Heini Weihe, ið skal reka Farodane Casa. Hann átti sjálvur fyritøkuna Ergo Design, sum 1. februar í ár legði saman við Farodane.

Í niðaru hæddini er framsýning av innbúgvi til privat, meðan tað í erva fyrst og fremst er talan um skrivstovuinnbúgv.

Fýra fólk fara at starvast í nýggja handlinum, og harafturat verða fýra montørar knýttir at virkseminum hjá Farodane Casa.



*Nógv fólk forvitnaðust og komu við góðynskjum, tá Farodane Casa hevði móttøku*







Lesið Sosialin -so eru tit við!